

## Løgtingsmaður spyr um fullveldisskjøl

Løgtingsmaðurin Sjúður Skaale vil hava løgmann at svara, hví fólk framvegis verða noktað innlit í eitt nú fundarfrásagnir frá fullveldissamráðingum.

Í morgin eru 10 ár liðin, síðani samráðingarnar millum landsstýrið og donsku stjórnina endaðu. Áhugin fyri hesum samráðingum var ovurstórur, og tær fingu nógva umrøðu.

Journalistar søktu um innlit í alt tilfar beinanvegin, men í 2000 var ikki givið innlit í alt tilfarið - t.d. fundarfrásagnir. Grundgevingin var, at málið ikki var avgreitt.

Men 10 ár seinni noktar løgmansskrivstovan framvegis almenninginum innlit, sigur løgtingsmaðurin Sjúrður Skaale, og tí spyr hann løgmann, hví innlit ikki verður givið, og nær skjølini kunnu gerast almenn.

- Tað skulu sera góðar grundgevingar til at nokta fólki innlit í tilfar, sum hevði so stóran áhuga og var so nógv umrøtt, sum hesar samráðingar. Og spyrjarin dugir ikki at síggja nakað í lógini um alment innlit, sum gevur løgmansskrivstovuni rætt til at nokta fólkið at síggja hesi skjøl, sigur Sjúrður Skaale.

# Hvat verður tað næsta?




Týskir felagsskapir vilja útihýsa Føroyum frá altjóða fótbólti, so leingi vit drepa grind

## Í MORGIN

**7/10 °C**




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Seinnapartin sami vindur av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig,

## MIKUDAGIN

**7/10 °C**




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

## HÓSDAGIN

**5/8 °C**




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Hvassur vindur ella skrið av suðri og útsynningi og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 6 og 10 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eutt hátrýst, 1028 hPa. yvir Írlandi fer í landsynning og ein hátrýstryggur til Íslands viknar. Eitt lágtrýst, 980 hPa. sunnan fyri Hvarvið stendur mestsum í stað og dýpist og brúgvalagið haðani kemur hendavegin.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Hvarvið stendur mestsum í stað og brúgvalagið við Føroyar fer spakuliga eystureftir.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

18. okt Mánin longst frá jørðini
23. okt Fullmáni
30. okt Seinna kvarter
3. nov Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. okt. | 08:41 | 21:04 | 07:41 | 20:04 | 07:56 | 20:19 | 10:41 | 23:04 | 11:41 | - | 06:56 | 19:19 | 05:56 | 18:19 | 08:56 | 21:19 | 09:56 | 22:19 | 08:26 | 20:49 | 09:41 | 22:04 |
| 26. okt. | 09:28 | 21:53 | 08:28 | 20:53 | 08:43 | 21:08 | 11:28 | 23:53 | 00:04 | 12:28 | 07:43 | 20:08 | 06:43 | 19:08 | 09:43 | 22:08 | 10:43 | 23:08 | 09:13 | 21:38 | 10:28 | 22:53 |
| 27. okt. | 10:19 | 22:44 | 09:19 | 21:44 | 09:34 | 21:59 | - | 12:19 | 00:53 | 13:19 | 08:34 | 20:59 | 07:34 | 19:59 | 10:34 | 22:59 | 11:34 | 23:59 | 10:04 | 22:29 | 11:19 | 23:44 |
| 28. okt. | 11:09 | 23:34 | 10:09 | 22:34 | 10:24 | 22:49 | 00:44 | 13:09 | 01:44 | 14:09 | 09:24 | 21:49 | 08:24 | 20:49 | 11:24 | 23:49 | - | 12:24 | 10:54 | 23:19 | - | 12:09 |
| 29. okt. | - | 12:00 | 11:00 | 23:38 | 11:15 | 23:53 | 01:34 | 14:00 | 02:34 | 15:00 | 10:15 | 22:53 | 09:15 | 21:53 | - | 12:15 | 00:49 | 13:15 | 11:45 | - | 00:34 | 13:00 |